# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Eik festir røtur í Danmark – hví ikki eisini í Bretlandi!

Nú í vikuni kunngjørdi Eik, at bankin hevur keypt størsta internetbankan í Danmark SkandiaBanken við 115.000 kundum. Hóast keypsprísurin ikki er kunngjørdur, so er greitt, at hetta er størsti handil, sum nøkur føroysk fyritøka hevur gjørt nakrantíð.

Keypið av SkandiaBanken skal fíggjast við einari kapitalhækkan seinni í ár.

Tað er gott, at peningur ikki liggur og svevur, sum vit hava sæð tað hjá onkrum av størru føroysku fyritøkunum seinnu árini, og sigast má, at tað hevur hepnast heilt væl hjá Eik seinnu árini. Timingin hevur verið góð í teirra íløgum, og hetta visir, at fyriuttan eitt sindur av hepni, so hevur hegni verið við frá leiðsluni í Eik.

At royna at fjøltátta inntøkugrundarlagið er altíð gott. Vit føroyingar hava stak ringar royndir av, at man bert hevur dúvað uppá Føroyar sum marknað, og tí er tað gott, at man roynir at breiða seg á aðrar marknaðir, fyri at fáa fleiri bein at standa á. Hetta er tað, sum Eik ger, og tykist tað skilagott.

Tó er umráðandi, at man spennir bogan akkurát rætt. Skjótt er at spenna hann ov nógv, so tað brestir, og lætt er at gera tað øvugta, har man als ikki spennir bogan, og tí tapir kappingina uppá forhond.

Eik hevur allar fortreytir fyri at gerast eitt veruligt lokomotiv í føroyska búskapinum, men tað krevur, at leiðslan framhaldandi hevur tunguna mitt í munninum, og ikki spennir bogan harðari enn neyðugt.

Væl er tað so, at Eik nú dúvar uppá fleiri marknaðir, men alt eru marknaðir, sum sveiggja nøkurlunda eins. Í hvussu so er, so er eingin immunur fyri heimskonjukturunum, men Eik kann hava heiluvágin ella sagina klára, skuldu einstakar av greinunum hjá teimum blivið sjúkar.

Ímeðan kundi Eik kanska eisini umhugsað at latið eina lítla grein vaksa inn á bretska marknaðin. London er størsti fíggjarmiðdepil í heiminum, og hann liggur á leið í somu frástøðu úr Føroyum sum Keypmannahavn. Spell at eingin føroysk fíggjarfyritøka er har, tí London er portrið til allan heimin í fíggjarhøpi. Bretland er heldur ikki minni relevant hjá føroyingum nú, tá sambandið millum Føroyar og Bretland í ár verður betrað við farma- og ferðamannasigling, og handilsmøguleikarnir harvið verða øktir munandi báðar vegir.

**Sosialurin**

## Var tað bara ein undarligur dreymur?

ROLF GUTTESEN
rg@geogr.ku.dk



**Somuleiðis verða tiltøk at forða "spekulatión" við fiskirættindum støðugt ment og sett í verk.**

Eg kom eitt kvøldið fram á samgonguskjalið og las setningin omanfyri fleiri ferðir. Hatta mundi siga nakað um, hvussu samgongan ætlaði at fara við "fólksins ogn", tilfeinginum í havinum, sum fólkið eigur.

**Spekulatión ella "spekulatión"?**
Hugsaði eisini um orðið spekulatión, og hví tað mundi standa í gásareygum? Er tað munur á spekulatión og "spekulatión"? Ella man tað vera tí, at teir meina at hettta góða orð kann hava ymsan týdning, alt eftir hvar í samfelagnum tú stendur?

Ella var tað so, at stættastríðið bleiv avlýst? Í hvussu so er í hesum valskeiði? So at "spekulatión" bara verður spekulatión, sum ikki skal forðast.

**Ein undarligur dreymur eina náttina**
Ná, men tað man hava malið nakað illa í mínum lítla høvdi, tí somu nátt hevði eg ein løgnan dreym. Eg droymdi, at øll vaksin fólk í Føroyum stillaðu upp á rað. Øksl við øksl. Tann fyrsti niðri á Vaglinum í Havn. Og har stóðu so fólk allan vegin niðan eftir Niels Finsens Gøtu, lið um lið, umleið ein metur í part.

**Har stillaðu øll upp á rað**
Og tað fortsetti niðan um Sjónleikarhúsið, framvið Plantasjuni og niðan eftir gamla Oyggjarvegnum. So langt eyga rakk stóðu fólk lið um lið niðaneftir. Hvat mundi vera á vási? Politiið segði frá, at har stóðu fólk allan veg niðan um Kleynsvarða, Gamla Enda og Norðara Skarð. Víðari ígjøgnum Mjørkadal og Mannafellsdal, um Skeiðsá, og oman ígjøgnum Hundsarabotn. Har stóðu fólk, fólk og uppaftur fleiri fólk. Framvið Statoil í Kollfaradali.

Á hesum 20 kilometra langa strekki, stóðu øll arbeiðsfør fólk í Føroyum stillaði upp, øksl móti øksl, lið um lið, kvinnur og menn, ung og gomul. Øll, sum henda dag orkaðu at standa á beinunum. Hvør hevði ein metur, so har vóru 1000 upp á ein kilometur, og 20.000 fólk upp á 20 kilometrar. Undarligur dreymur.

**20.000 bundir av hundraðkrónuseðlum**
So kom ein stórur konteynara-lastbilur koyrandi. Ein maður sat aftanfyri. Hann rætti ein stóran plast-sekk fram. Bilurin koyrdi spakuliga fram við, og hvørt einasta menniskja í hesi næstan óendaligu rekkju rætti eitt bundi av hundraðkrónuseðlum fram. Í hvørjum bundi vóru hundrað seðlar. Hvør maður og kona allan vegin til Havnar hevði tíggju túsund krónur í hondini. So hvørt sum lastbilurin koyrdi framvið, fylti maðurin upp í sekkin.

Tá sekkurin var fullur av hundraðkrónuseðlum, bleiv hann blakaður upp í konteynaran, og hann fór tolin at fylla upp í ein annan sekk. Øll 20.000 fólk, tey arbeiðsføru í Føroyum, sum her stóðu á rað, lótu hvør 10.000 kr í stórasekk. Ganga vit hesi bæði stóru tølini saman, so fáa vit 200.000.000 krónur ella 200 milliónir.

**Alt fór lógliga fram**
Maðurin í bilinum gjørdi einki ólógligt, segði politiið. Bilurin koyrdi í høgru síðu allan vegin, hann hoyrdi ongantíð ov skjótt, og maðurin var ikki ávirkaður av alkoholi. Alt gekk regluliga fyri seg, ferðslulógin bleiv ongantíð brotin.

Men, hví fekk maðurin í konteynarabilinum allar hesar pengarnar? Hvat hevði gjørt hann fortjentan til at fáa eina góða mánaðarløn frá øllum arbeiðsførum, at kalla hvørjum einasta húsarhaldi í Føroyum?

Kanska var tað tí, at samgongan ikki loyvir "spekulatión", men bara vanligari spekulatión? Ella er tað bara tí, at stættastríðið er avlýst, í hvussu er í talum og politikaratosi. Ella, tey sum eiga, teimum skal meira vera givið? Tíðindi siga, at sami leikur verður framførdur aftur á hvørjum ári tey næstu 10 til 20 árini.

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.